gult cyan magenta svart



## HB hevur vunnið nógv mest

*Kvinnurnar hjá KÍ hava tapt tríggjar finalur, og hóast GÍ í níti árunum vann FM fýra ferðir á rað, so vóru steypasigrarnir bara tveir*



HB er annar parturin í báðum steypafinalunum í morgin. Hagtølini siga, at á mannfólkasíðuni hevur tað ligið betur fyri hjá HB í steypakappingini, enn tað hevur gjørt hjá øllum hinum feløgunum. Hjá kvinnunum hevur tað eisini roynst væl hjá HB, sjálvt um grannafelagið eigur fleiri steypasigrar. Hjá kvinnunum hevur tað verið kappast í steypakappingini síðani 1990. HB hevur verið í finaluni fimm ferðir, og tær hava vunnið fýra ferðir. B36 hevur verið í finaluni seks ferðir, og tær hava vunnið fimm ferðir.

KÍ hevur tríggjar ferðir verið annar parturin í kvinnufinaluni, men tær hava verið vónbrotnar hvørja ferð. KÍ hevur tvær ferðir tapt í finaluni móti HB – í 1996 og í fjør, tá HB vann eftir longda leiktíð – og í 1997 móti B36.

Síðani tað í 1955 varð farið undir steypakappingina hjá monnum, hevur HB vunnið meiri enn annað hvørt ár. Burtursæð frá 1970 hevur finala verið á hvørjum ári. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað hava verið 44 vinnarar, og HB hevur vunnið ikki færri enn 25 ferðir.

Gøtumenn vóru meistarar øll árini frá 1993 og til 1996. Bara tað seinasta árið megnaðu teir eisini at vinna steypakappingina. Í 1997, tá B36 var meistari, endurtóku Páll Guðlaugsson og hansara menn sigurin í kappingini um løgmanssteypið. GÍ vann fyrstu ferð FM í 1983. Tá vunnu teir eisini steypakappingina.

JH

**Kvinnur 1990–1999**

1990: HB
1991: B36
1992: Skáli
1993: B36
1994: B36
1995: B36
1996: HB
1997: B36 (Dagblaðssteypið til ognar)
1998: HB
1999: HB
kelda: Kappingarskipanin

**Menn 1955–1999**

1955: HB
1956: TB
1957: HB
1958: TB
1959: HB
1960: TB
1961: TB
1962: HB
1963: HB
1964: HB (ísafjarðarbikarið til ognar)
1965: B36
1966: KÍ
1967: KÍ
1968: HB
1969: HB
1970: eingin finala
1971: HB
1972: HB
1973: HB (1. ísafjarðarsúlan ogn hjá HB)
1974: VB
1975: HB
1976: HB
1977: TB
1978: HB
1979: HB
1980: HB (2. ísafjarðarsúlan ogn hjá HB)
1981: HB
1982: HB
1983: GÍ
1984: HB
1985: GÍ
1986: NSÍ
1987: HB
1988: HB (3. ísafjarðarsúlan ogn hjá HB)
1989: HB
1990: KÍ
1991: B36
1992: HB
1993: B71
1994: KÍ
1995: HB
1996: GÍ
1997: GÍ
1998: HB (1. løgmanssteypið ogn hjá HB)
1999: KÍ

**KELDA:** Fótbóltsárbøkurnar 1992 til 1999

# HB er stórvavorittur

*Gøtumenn halda seg ikki hava nakað at tapa, meðan teir í HB ikki halda, at støðan í landskappingini kann brúkast, tá talan er um steypafinalu*

Hyggja vit eftir støðutalvuni í landskappingini, so er eingin ivi um, at HB er favorittur at vinna steypafinaluna í morgin. HB tykist vera á veg móti FM heitinum, meðan gøtumenn higartil hava havt ilt við at slíta seg leysan úr aftara endanum.

– HB er favorittur. Vit hava einki at tapa og fara í Gundadal fyri at gera okkara besta. So fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur, sigur liðformaðurin hjá GÍ, Magni Jarnskor.

Rúni Nolsøe er liðformaður hjá HB. Mánadagin komu hann og liðfelagarnir aftur til Føroya, eftir at teir leygardagin høvdu verið í Ungarn og spælt í Intertoto Cup. Liðformaðurin heldur, at teir hava verið eitt sindur troyttir í vikuni. Teir hava vant eitt sindur á Tórsvølli, og teir hava sinniliga hitað upp til stóru uppgávuna í morgin. Men Rúni Nolsøe heldur ikki, at HB er upplagdur favorittur:

– Tað er rætt, at tað hevur gingið væl hjá okkum í ár. Men ein steypafinala er heilt øðrvísi enn ein long landskapping. Vit hava sjálvsálit at spæla finaluna, men vit eru grreiðir yvir, at tað verður torført. GÍ hevur vunnið nógv, og teir eru greiðir yvir, at um teir skulu vinna nakað í ár, so skal tað vera í steypakappingini. Tí er tað heilt opið. Vit vunnu landskappingardystin í Gøtu 2–1, men tá var tað sera tætt, staðfestir HB liðformaðurin.

Hjá HB hava allir spælararnir verið til venjing í vikuni. Tað er neyvan sannlíkt, at Ion Geolgau fer at broyta liðið, sum hevur staðið seg so væl í landskappingini. Tað vil við øðrum orðum siga, at rumenararnir báðir ivaleyst fara at vera á beinkinum frá fyrsta bríksli.

JH



*Liðskiparin hjá HB heldur ikki, at teir eru at meta sum favorittar í morgin*

# Nógvir royna seg fyri fyrstu ferð

*Bæði hjá GÍ og HB hava útskiftingarnar verið nógvar, síðani liðini síðst vóru í finaluni*



*Janus Joensen er ein av leikarunum, sum fyri fyrstu ferð skal royna seg í finaludysti um løgmanssteypið*

Tað gongur skjótt í føroyskum fótbólti. Manningarnar á liðunum hjá HB og GÍ, sum í morgin skulu spæla á Tórsvølli, eru bæði ein staðfesting av, at skiftingarnar millum feløgini eru nógvar, og av at bæði GÍ og HB hava verið og eru í einum ættarliðsskifti.

Tað eru tvey ár síðani, at HB var í finaluni, og tað eru fýra ár síðani, at GÍ var í finaluni. Hjá HB eru fýra framvegis í 1. deildarhópinum, sum vóru millum teir fyrstu ellivu, tá teir fyri tveimum árum síðani vunnu á KÍ. Teir eru Hans á Lag, Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe og Andrew av Fløtum. Tríggir aðrir, sum vórðu skiftir inn ta ferðina, eru eisini við hesa ferð: Jóhannes Joensen, Rói Árting og Ingi Rasmussen. Málverjin Bárður Johannesen sat á beinkinum allar 90 minuttirnar, tá HB vann 2–0 á KÍ.

Tá GÍ tvær ferðir var í Gundadali í 1996 og stríddist við HB, áðrenn teir høvdu vunnið steypafinaluna, vóru fýra spælarar, sum fara á vøllin í dag, á liðnum. Teir eru Poul Ennigarð, Rúni Justinussen, Henning Jarnskor og Pauli Jarnskor. Sunvard Joensen sat á beinkinum allar 90 minuttirnar, og tað gjørdi Magni Jarnskor, sum var um at koma fyri seg eftir beinbrot, eisini. Jóan Petur Olsen, sum var við tá, er framvegis í 1. liðshópinum, men vit hava skilt tað soleiðis, at hann verður ikki førur fyri at spæla í morgin.

Í 1997 var GÍ aftur í Gundadali. Ta ferðina smurdu teir VB av. Ta ferðina var Sunvard Joensen málverji, og harafturat vóru Pauli, Magni og Henning Jarnskor og Rúni Justinusen ímillum teir fyrstu ellivu, og Jóan Petur Olsen kom á vøllin síðsta korterið.

JH

gult cyan magenta svart



# Johan setir nýtt met hvørja ferð

*GÍ venjarin hevur í morgin fyri 16. ferð ábyrgdina av øðrum liðnum í finaluni, og higartil hevur hann verið við til at vinna ellivu ferðir*

Ein av monnunum, sum í morgin fara í Gundadal at telvast um fyrsta atgongumerkið til Europa Cup komandi summar, setir nýtt met, hvørja ferð hann fer á vøllin. Talan er um venjaran hjá GÍ, Johan Nielsen. Hann sigur seg ongantíð hava gingið so nógv upp í tølini. Men tá vit hava í huga, at hann síðani í 1968 og fram til í dag – okkurt einstakt ár er farið burturímillum – hevur havt ábyrgdina av onkrum 1. liði, so er skjótt at staðfesta, at dystartalið hjá honum í landskappingini er fleiri ferðir hundrað.

Johan Nielsen hevur eisini verið við í nógvum steypafinalum. Tá vit spyrja hann, hvat finalutalið man vera, og vit í felag fara at rokna, koma vit fram til, at finalan í morgin verður tann sekstanda. Fimtan ferðir hevur hann havt ábyrgdina av HB liðnum, og eina ferð hevur hann havt ábyrgdina av GÍ.

Tríggjar ferðir hava Johan Nielsen og HB staðið og hugt at, meðan hitt finaluliðið hevur fegnast. Í 1974 og í 1977 taptu teir finalurnar ímóti ávikavíst VB og TB, og í 1996 var tað liðið, sum Johan Nielsen hevur vant mest tey seinnu árini, sum vann. GÍ og HB spældu tvær ferðir 120 minuttir, áðrenn Símun Petur Justinussen kundi lyftta steypinum. Johan hevur verið við til at vunnið ellivu finalur fyri HB. Finalan hjá honum og GÍ var í 1990, tá KÍ hølvaði teir av.



*Einki er at ivast í, hvør er mest royndi og mest vinnandi venjarin í Føroyum. Johan Nielsen skal fyri 16. ferð hava ábyrgdina av einum parti í steypafinaluni*

**Minnisríkasta árið**

Tá Johan fyrstu ferð hevði ábyrgdina av HB liðnum, sum vann steypafinaluna, spældi hann við sjálvur. Tað var í 1968. Men tá vit spyrja hann, um tað er nøkur finala, sum hann serliga minnist til, so er hann skjótur at svara, at endadysturin í 1978 stendur frammarlaga í huganum:

– Tað árið var hugaligt hjá okkum. TB hevði eitt fínt lið tá. Teir vóru meistarar í 1976 og í 1977, og teir høvdu vunnið steypafinaluna í 1977. TB var favorittur bæði at vinna FM og ísafjarðarsúluna í 1978. Tað endaði við, at vit í HB vunnu bæði steypakappingina og meistaraskapin. Avgerandi dystin í landskappingini spældu vit á Sevmýri. Teir høvdu verið meistarar, um teir ikki høvdu tapt. Teir vóru favorittar, men tað eydnaðist okkum at vinna.

Finalan um ísafjarðarsúluna varð spæld á Sandi. Veðrið var gott, og tað var nógv fólk av Tvøroyri og úr Havnini, og har vóru nógvir sandoyingar. Eg minnist finaluna fyri eftir tátíðar viðurskiftum sera gott spæl, og vit vóru so hepnir at vinna, minnist mest royndi føroyski venjarin aftur á.

Eingin kemur upp á síðuna á Johan Nielsen í finalum, steypasigrum, og meistaraskapum, og hann hevur oftari enn nakar vunnið steypakappingina og landskappingina sama ár. Johan hevur saman við HB vunnið báðar kappingarnar í 1973, 1975, 1978, 1981, 1982 og í 1988.

Ioan Geolgau, HB venjarin, hevur nógvar royndir, men sjálvandi hevur hann ikki vunnið føroysku kappingina serliga ofta. Hann kom til Føroya í 1998, og tað árið vann liðið hjá honum bæði FM og steypakappingina.

JH

# Martin sigur farvæl

*Eftir finaludystin sunnudagin stingur Martin Thomsen, sum í vár hevur leikt í GÍ vejruni, í sekkin. Leiðin gongur nú aftur til Danmarkar*



*Martin Thomsen, sum her sæst i dysti móti B36, spælir sín seinasta dyst fyri GÍ á hesum sinni, tá steypafinalan verður blást ígongd sunnudagin*

Gøtumenn hava vant á grasvøllinum á Svangaskarði fyrrapartin av vikuni. Í gjárkvøldið skuldu teir venja á Tórsvølli.

Jóan Petur Olsen hevur verið til venjingar í vikuni, men hann verður ikki við í morgin. Skaðin, sum hann ehvur drigist við, vitjaði aftur í fyrrakvøldið. Helgi L. Petersen hevur bruna í hælsinuni, men teir rokna við, at tað fer at bera til at pjøssa so mikið um hann, at hann kann spæla.

Poul Ennigarð er komin aftur úr Danmark, men nú missir GÍ ein annan spælara. Martin Thomsen, danin sum hevur verið stúttur í miðverjuni, fer nú úr Føroyum. Finalan í morgin verður síðsti dysturin hjá honum fyri GÍ.

JH

## Støðan undan sundalagsstevnuni

*Niðanfyri er støðan í FM-kappingini prentað. Fyrsta talrøðin sýnir, hvussu nógv stig bátarnir fingu á jóansøku, meðan onnur røðin sýnir samlaða stigatalið*



**5-mannafør, dreingir**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldrið | 7 | 21 |
| 2 | Havfrúgvin | 5 | 14 |
| 3 | Kollur | 3 | 12 |
| 4 | Drekin | 4 | 11 |
| 5 | Sílið | 0 | 4 |
| 5 | Royndin Fríða | 2 | 4 |
| 7 | Spógvin | 1 | 1 |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 7 | 21 |
| 2 | Hvessingur | 3 | 11 |
| 3 | Gongurólvur | 5 | 10 |
| 3 | Fuglfirðingur | 2 | 10 |
| 5 | Páll Fangi | 4 | 9 |
| 6 | Sólmundur | 0 | 3 |
| 7 | Riddarin | 0 | 1 |
| 7 | Lómur | 1 | 1 |

**5-mannafør, gentur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Frúgvin | 7 | 21 |
| 2 | Ørnin | 5 | 13 |
| 3 | Drekin | 4 | 9 |
| 4 | Hvassi | 3 | 8 |
| 5 | Tjaldrið | 2 | 7 |
| 6 | Beinta | 0 | 5 |
| 7 | Sílið | 0 | 2 |
| 8 | Havfrúgvin | 1 | 1 |

**6-mannafør, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Hvessingur | 5 | 19 |
| 2 | Strálan | 7 | 14 |
| 3 | Hósvíkingur | 3 | 13 |
| 4 | Kollfirðingur | 4 | 9 |
| 5 | Gongurólvur | 0 | 5 |
| 5 | Sólmundur | 2 | 5 |
| 7 | Snopprikkur | 1 | 1 |

**8-mannafør, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 7 | 21 |
| 2 | Toftabáturin | 5 | 15 |
| 3 | Nevið Reyða | 4 | 11 |
| 4 | Gullbrandur | 3 | 10 |
| 5 | Húsavíkingur | 2 | 4 |
| 6 | Oyndri | 0 | 2 |
| 6 | Miðvingur | 1 | 2 |
| 8 | Kvívíkingur | 0 | 1 |

**10-mannafør, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Nólsoyingurin | 7 | 18 |
| 2 | Vestmenningur | 4 | 15 |
| 2 | Havnarbáturin | 5 | 15 |
| 4 | Eysturoyingur | 3 | 9 |
| 5 | Vágbingur | 2 | 6 |
| 6 | Suðringur | 1 | 1 |
| 6 | Kjølur | 0 | 1 |